# 76,8 miljónir krónu






*Teir kunnu vera nøgdir báðir, skipararnir og brøðurnir, Bogi (fremstur) og Jón Rasmussen*

**ÚRSLIT** Ársúrslitið hjá partafelagnum Hvalnes, sum eigur verksmiðjuskipið Norðborg, var í fjør góðar 67 miljónir krónur fyri skatt og avskrivingar. Í 2010 rindaði felagið heilar 76,8 miljónir krónur í hýrum og lønum

Vilmund Jacobsen

Tað hevur gingið væl hjá verksmiðjuskipinum Norðborg, síðan skipið kom í fiskiflotan fyri skjótt tveimum árum síðan.

Skip og manning fóru á fyrsta túrin hin 3. juni í 2009, og longu hetta fyrsta árið fiskaði Norðborg fyri út við 100 miljónir krónur.

Eftir at skipið hevði verið í føroyska fiskiskipaflotanum í stívliga 15 mánaðir, hevði Norðborg longu fiskað fyri tilsamans 250 miljónir krónur, ið er tað sama, sum skipið kostaði at smíða.

### Flott úrslit

Árið 2010 er hitt fyrsta heila árið, sum Norðborg hevur verið í vinnu. Hetta árið hevur av sonnum vignast væl, og veiðivirðið í fjør lá um 200 miljónir krónur.

At árið í fjør veruliga royndist væl, eins og árið undan eisini var sera gott, sæst aftur í ársúrslitinum hjá partafelagnum, Hvalnes, sum eigur verksmiðjuskipið.

Ársúrslitið hjá felagnum fyri 2010 vísir nevniliga, at felagið hevði eitt avlop á stívliga 67 miljónir krónur – fyri skatt og avskrivingar.

Eftir skatt og avskrivingar var ársúrslitið 27,4 miljónir krónur. Hetta er eitt munandi betri úrslit enn undanfarin ár hjá felagnum.

Í 2009 hevði partafelagið Hvalnes eitt avlop á 3,1 miljónir, og í 2008 var avlopið 1,6 miljónir krónur. Taka vit árini 2007 og 2006, var ársúrslitið hesi bæði árini – eftir skatt og avskrivingar - ávikavist 13,5 og 16,2 miljónir krónur.

### Góðar hýrur

Í fjør rindaði partafelagið, sum eigur verksmiðjuskipið Norðborg, eisini 76,8 miljónir krónur í hýrum og lønum.

At samlaði hýru-og lønarparturin er so stórur, sæst heilt vist aftur í nærumhvørvinum og í samfelagnum sum heild.

Við Norðborg hvønn túrin eru umleið 30 mans og við tí manningarskifti, sum er, eru

---

# Bíðaðu sum longst við at áseta



*- Vit kunnu ikki seta okkum afturá og lata aðrar okkara rætt til einkis, sigur Jacob Vestergaard*

**VIT BÍÐAÐU** Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, sigur, at Føroyar bíðaðu við at áseta eginkvotu á makreli, til allar samráðingarleiðir vóru royndar. – Tað harmar meg, at vit ikki náddu eini semju, sigur hann

Vilmund Jacobsen

Men samstundis, sum tað harmar landsstýrismannin, at semja ikki fekst í lag millum strandalondini, ásannar hann, at hini strandalondini ikki hava tikið til eftirtektar føroyska rættin til makrelin, tá tey hava ásett sær kvotur.

- Tað, sum er neyðugt fyri at semjast, er, at øll strandalondini ásanna, at makrelurin hevur broytt útbreiðsluøki, og at grundarlagið undir gomlu strandalandaavtaluni tí er burtur.

Landsstýrismaðurin leggur dent á, at Føroyar hava eitt rættvíst krav til makrelin í Norðuratlantshavinum.

- Vit kunnu ikki seta okkum afturá og lata okkum lynda, at hini londini gera